## § 8. Ásetingar fyri umráðispart A4 í 3. grundumráði

1 Umráðisparturin verður lagdur til opna/lága bústaðabygging.

Opin/lág bústaðabygging er bygging, sum í vavi er at sammeta við sethúsa- og tvíhúsabygging.

Byggivaldið kann geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyrir býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum bústaðarøki og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.

2 Virkini skulu kunna flokkast í umhvørvisflokki 1-2 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

Tórshavnar kommuna hevur gjørt eina reglugerð um flokking av virkjum, sum ásetir fjarstøðu, ið mett verður at vera neyðug millum viðkomandi virkir og bústaðarøkir. Hendan reglugerð er góðkend av býráðnum 19. februar 2009 mál nr. 2007-1253.

3 Skipanin av økinum skal taka atlit til og hóska til kringliggjandi bústaðarøki.

4 Minst 20% av samlaðu víddini fyri eitt natúrligt avmarkað øki, skal vera lagt til tilhaldspláss.

Natúrligt avmarkað øki í mun til lendi, skap, mørk (t.d. vegir), bygging, dámin í økinum o.a.
Tilhaldspláss eru øki, ið kunnu nýtast til uppihald, spæl, trivna og líknandi. Tilhaldspláss eru ikki øki, ið verða nýtt til parkering, reinsiverk, vegir og líknandi.

5 Byggistigið skal ikki fara upp um 0,30.

6 Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,70.

7 Hús skulu ikki verða bygd við meira enn tveimum hæddum umframt nýttum lofti. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.




8 Hús við vanligari mønureising skulu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna.

9 Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, skal tann lægra síðan ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan ikki vera hægri enn 7,5 til hægsta punkt við útvegg.




10 Mest loyvda longd á hvørjari framsíðu er 20 m.

5 m skulu verða millum hvørja framsíðu.

11 Loyvd skelting í hesum umráðisparti er sum víst á talvu niðanfyri og sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna hevur gjørt eina skeltisreglugerð, góðkend av býráðnum 19 september 2024 mál nr. 22/02144.

| | Tænastu-skelti | Lýsingar-skelti | Vinnu- og stovnsskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | | x, einans “Skelti-virki í egnum bústaði |